átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið



*Hesa vikuna:*

**John S. Myllhamar**

## "Eg trúgvi á fyrigeving syndanna"

Úr triðju trúargrein

Eldri ein trúgvandi kristin gerst, størri gerst fyri honum at trúgva á fyrigeving syndanna dag eftir dag. Alt í lívi hins kristna er treytað av tí, bæði sigursríka stríðið móti syndini, innari vøksturin í náðini, hin sjálvbodna tænastan fyri Guð og heilaga tøkkin í hjartanum. Heilagi andin skapar játtan av syndini.

Men tað eru eisini tey, ið ikki syrgja yvir synd sína, men bara yvir fylgjurnar av henni. Og tað nýtist menniskja onga hjálp frá hinum heilaga anda fyri at gera. Káin, hin fyrsti manndráparin, syrgdi sáran. Hendan sorg dreiv hann enntá til Guð. Og tá ið hann stóð fyri ásjón Harrans, segði hann: "Misgerð mín er mær ov tung at bera"...

Hetta kundi tykjast vera ein djúp og álvarsom syndajáttan. Men tað var langt ífrá tilfeldið. Káin syrgdi sáran. Tó ikki yvir synd sína, men yvir sváru fylgjurnar av syndini fyri hann. Káin vendi sær til Guð. Kortini ikki fyri at gera upp við Guð sína ræðuligu synd, men fyri at fáa verju fyri fylgjunum av syndini. Og tá ið hann av tí náðiríka Guði hevði fingið hesa verju, "fór hann burtur frá ásjón Harrans og settist niður í landinum Nod", ið merkir flýggjan. Soleiðis syrgja allir eftirkomarar Káins yvir synd sína.

Øðrvísi við tí iðrandi synduga menniskjanum, sum ikki flýggjar frá, men til - fram fyri Guðs ásjón og biður um fyrigeving syndanna og fær at vita frá honum, at allar syndir tínar eru tær fyrigivnar, alt er gjørt upp, syndir tínar eru útstrikaðar, tú er barn mítt. Amen!

# Russell Crowe skal doypast

**Kendi filmsleikarin Russell Crowe ætlar at lata seg doypa saman við yngsta soni sínum, Tennyson. Russell, ið hevur havt høvuðsleiklutir í filmum sum til dømis "Gladiator" og "A Beautiful Mind", metir tey tíggju boðini sum grundarlag undir samfelagnum**



*Russell Crowe in action, soleiðis sum mong kenna hann. Í næstum verður hann doyptur*

*Mynd: polfoto*

Ætlanin er at Russell, sum býr í Australien, skal lata seg doypa við sama høvi sum yngsti sonurin verður doyptur. Elsti sonurin, Charlie varð doyptur fyri trimum árum síðani.

Dópsætlanirnar vórðu avdúkaðar í samband við eina samrøðu við amerikanska tíðarritið "Men's Journal 1", sum kemur út nú í desember mánaði.

Í samrøðuni sigur filmsleikarin:

- Tá talan var um foreldur míni, so lótu tey meg og bróður mín sjálvar avgera okkara viðurskifti við Gud, tá vit komu í rættan aldur. Eg havi hugsað nógv um hetta í seinastuni: Um eg haldi, at tað hevur týdning at míni børn verða doypt, - hví so ikki eg sjálvur?, sigur hann og leggur síðani aftrat:

- Tað er nakað størri, sum er drívmegin í okkum øllum. Tí eri eg sinnaður at taka stigið, og eg ynski at gera tað í hesum árinum.

## Tók avgerð sjálvur

Tað er ikki nýtt, at Russell Crowe hevur eina andaliga síðu. Tað kann tó kanska koma óvart á summi, tí umrøðan av hansara lívi uttanfyri sjónleikaraheimin hevur mest handlað um bardagar og ógvusligt illsinni.

Fyri nøkrum árum síðani gav hann eitt innlit í andaligu bakgrund og støðu sína, í eini longri samrøðu.

- Bæði foreldur míni vóru doypt í ensku anglikansku kirkjuni, men eg varð aldrin doyptur, sum var sera óvanligt í New Sealandi í 1964... Eg vaks upp undir løgnum viðurskiftum við kirkjuna. Vit vóru aldrin í kirkju sum familja, men fyri mammu mína var tað í lagi at eg gekk í kirkju á ymiskum støðum – og tí var eg bæði í kirkju í teirri anglikansku, presbyteriansku og katólsku kirkjuni, greiðir hann frá.

- Tá eg hyggi eftir teimum tíggju boðunum, kann eg ikki lata vera við at hugsa við mær sjálvum – tey mugu verða skrivað av eini ikki-menniskjansligari veru. Tað eru ting í buddhismuni, sum eg eisini eri samdur við, men um ein tekur hesi 10 bókstavliga og veruliga fylgdi teimum, so kundi ein hópur av tungari lóggávu verðið lagdur til viks ... Mær tykir, at hesi eru eitt gott grundarlag at byggja eitt samfelag á, sigur hann.

Dópshandlingin verður í eini lítlari kirkju í byzantiskum stíli, sum Russell lat byggja á australsku ranch síni í samband við brúdleyp sítt við Danielle Spencer í 2003.

Herfyri segði hann við blaðið New Zealand Herald, at "kirkjan er vígd og alt hitt ... og at vit brúka hana alla tíðina".

Russell Crowe er millum annað kendur frá vælumtóktum filmum sum "Gladiator" og "A Beautiful Mind". Í løtuni toppar hann listan í USA við filminum "American Gangster".

# Danir elska nýggjar bíbliutýðingar

Sølan av tveimum nýggjum týðingum av Bíbliuni er nógv størri enn nakar hevði torað at ímynda sær. Eftir trimum vikum var "Bibelen på hverdagsdansk" seld í 4000 eintøkum. Somu góðu undirtøkuna hevur "Den Nye Aftale – Det Nye Testamente på nudansk" rokkið eftir bert einari viku.

Um ein hugsar um, at tey flestu frammanundan hava eina autoriseraða Bíbliu standandi á hillini heima við hús, er góða undirtøkan ótrúlig, staðfestir religiónssosiologurin á Københavns Universitet, Morten Warmind.

- Hetta má vera eitt tekin um, at fólk í roynd og veru vilja lesa í Bíbliuni og eru áhugað í boðskapinum, men halda hinvegin, at tann autoriseraða hevur eitt ov tungt mál, sigur hann.



Onnur meta, at góða undirtøkan kemur eftir nógvu umrøðuna av bókini hjá Dan Brown "Da Vinci Code". Her varð kristindómurin latin í nútíðar klæði, og milliónir av fólkum fingið harvið eina meiri samanhangandi tilgongd til kristindómin enn tey áður høvdu fingið gjøgnum Bíbliuna.

- Bøkurnar geva eina nýggja og breiðari fatan av boðskapinum í Bíbliuni og broyta okkara átrúnaðarliga tos. Longu í næsta ættarliði fara sálmayrkjarar at skriva út frá hesum nýggju týðingunum, sigur Hans Raun Iversen, lektor í praktiskari gudfrøði í Keypmannahavn.

Summi eru komin við atfinningum ímóti nýggju týðingunum, tí tær hava tikið burtur dýpdina av Bíbliunnar máli. Hvørki Morten ella Hans Raud vænta at tann autoriseraða Bíblian ella kristindómurin taka skaða av nýggju týðingunum. Tvørturímóti.

- Undir øllum umstøðum eru bøkurnar bert eitt supplement, og koma ikki ístaðin fyri nakra teirra, sigur Tine Lindhardt, aðalskrivari í danska Bíbliufelagnum, og leggur aftrat:

- Týðingarnar broyta jú bert nakað fyri tey, sum frammanundan kenna týdningin av orðunum. Endamálið eru júst at geva meiri nútíðar týðingar av orðum, sum til dømis náði og heilagur, sigur hon.

## Rúslinja alt samdøgrið

**Bláikrossur:** Rúslinjan hjá Bláa Krossi hevur higartil verið opin tvey kvøld um vikuna, men víðkar nú tænastuna og svarar hereftir alt samdøgrið. Leiðslan hjá Bláa Krossi hevur nú, í samráð við sjálvbodnu ráðgevararnar hjá Rúslinjuni avgjørt, at víðka hesa tænastuna, so nú svarar Rúslinjan hvørt vikuskifti frá fríggjakvøldi til sunnukvøld frá kl. 20-24. Fyrstu ferð víðkaða skipanin virkaði var seinasta fríggjakvøld. Hetta verður gjørt, tí at mett verður, at størri tørvur er á hjálp og ráðgeving í vikuskiftunum enn mitt í viku. Tænastan verður nú í veruleikanum ein døgntænasta, tí at uttanfyri áðurnevndu klokkutíðir verður Rúslinjan víðaristillað til vakthavandi ráðgeva á Blákrossheiminum, har vakt er alt samdøgrið. Endamálið við Rúslinjuni er, at veita hjálp og vegleiðing til teirra, ið liva í misnýtslu av rúsdrekka og rúsandi evnum, ella sum liva saman við einum misnýtara. Ráðgevararnir hjá Rúslinjuni hava fulla tagnarskyldu, og bæði brúkarar og ráðgevarar hava rætt til at vera ónevnd. Rúslinjan hjá Bláa Krossi hevur tlf. 318586.

## Ungdómsmøti uppá skift

**Havn:** Hóskvøldið var felags ungdómsmøti hildið í Oasuni í Hoyvík. Hetta er ikki serstakt í sjálvum sær, men er í roynd og veru eitt felags arbeiði millum tey ungu í samkomunum í Evangeliihúsinum, Oasuni og í Filadelfia. Ungdómsleiðararnir í hesum samkomum hava tætt samband hvør við annan, og hava megnað at skapt ein einleika, sum tey áður bert kundu droyma um. - Tað tykist at tey ungu hava skilt týdningin av at byggja Guds ríki saman - og ikki bert hvør sær, verður sagt. Hesi felags møtini eru eina ferð um mánaðin og skiftast millum samkomurnar, og draga eisini nógv onnur ung til sín. Tað hava verið upp til 150 ung á hesum møtunum. Møtini eru lívlig við góðum lovsangi, talu og forbøn. Á felagsmøtinum hóskvøldið talaði Pauli Høj úr Kelduni, Hildibrandur Olsen úr Filadelfia leiddi møtið og Bjarni Steintún úr Oasuni leiddi lovsangin.